Lívdin
- í lívd hins hægsta

Juli - august 2008



# Nýggi samkomubygningurin hjá Lívdini



*Tekning av nýggja samkomubygninginum hjá Lívdini í Hoyvík*

Týskvøldið 17. juni hevði Lívdin samkomufund í hølunum á Brekku. Á fundinum greiddi Jóhan Syderbø, vegna byggibólkin, frá nýggja samkomubygninginum, sum skal byggjast á grundøkið hjá Lívdini við Vegin Langa í Hoyvík. Tekningarnar eru gjørdar, og samkoman hevur fingið byggiloyvi til bygningin.

Vegna fíggjarbólkin greiddi Birgir Nielsen frá fíggjarstøðuni, og Jógvan Zachariassen hevði eisini ein boðskap og eina visión fyri nýggja samkomubygningin.

Grundøkið er 6.500 fermetrar stórt, og samkomubygningurin verður tilsamans 2.900 fermetrar. Salurin fer at rúma 800 fólkum.

## Tak tær av løttum

Vit hava øll brúk fyri at hvíla! Ja, sjálvt Jesus dugdi at síggja, hvussu umráðandi tað var at hvíla. Í Markusi 6:30 lesa vit: „Tá segði Hann við teir: ‚Komið nú við Mær burtur til oyðið stað, har vit fáa verið einsamallir, og hvílið tykkum eitt sindur!'" Jesus hevði arbeitt hart í nógvar dagar, og henda dagin hevði Hann givið 5000 monnum at eta – kanska 10-15 túsund við kvinnum og børnum. Men so sigur Hann við lærisveinar sínar: „Hey, lat okkum fara burtur fyri okkum sjálvar at taka okkum av løttum!!"

Orsøkin til, at Jesus kláraði nógva strongd, var, at Hann dugdi at taka sær av løttum. Hann vitsti, nær Hann skuldi sleppa arbeiðinum og hvíla. Vit lesa fleiri ferðir um, at Hann fór niðan í fjøllini ella út í oyðimørkina at hvíla seg. Hesir túrar endurnýggjaðu Hann og góvu Honum kraft og styrki at halda á við arbeiði Sínum.



Bøn mín er, at vit fara at gera sum Jesus í summar. Ynski mítt fyri okkum øll er, at vit finna nakrar dagar, tá vit veruliga kunnu taka okkum av løttum. Okkum tørvar eisini endurnýggjan og kraft og styrki til at halda á við tí arbeiði, sum vit gera. Jesus dugdi at síggja, hvussu umráðandi hetta er. Eg vóni, at vit eisini fara at síggja tað.

Góða summarfrítíð!

*Jógvan Zachariassen*

# Vinir í Lívdini

## Tillukku við brúdleypinum



Leygardagin 31. mai giftust Jastrid Hovland og Absalon Østerø Sivertsen í býráðssalinum í Havn. Jastrid er dóttir Drikku og Øssur Hovland í Havn, og Absalon er sonur Turid og Osvald Sivertsen í Norðdepli. Vit ynskja teimum hjartaliga tillukku við hjúnabandinum.

## Dópur í samkomuni

Týskvøldið 27. mai vórðu tríggir mans í samkomuni doyptir. Teir vóru: Johan Djurholm, Mikkel Johannesen og Fríði av Vollanum. Dópurin fór fram í Hebron á Argjum.

## Sølva Ford í Lívdini



Sølva Ford hevur sungið í nógvum ymiskum samkomum, og sunnudagin 8. juni sang hon í Lívdini.

## Hanna Andreasen um trivnað



Leygardagin 14. juni hevði kvinnubønarbólkurin eitt serligt tiltak í hølunum á Brekku.

Á skránni var morgunmatur, hugni og bønarløta. Harumframt hevði Hanna Andreasen fyrilestur við heitinum „Trivnaður og sløg av persónmenskum".

Hon nam eisini við onnur evni sum t.d., hvat krevst fyri at trívast í arbeiðinum, og hvat rænir trivnað og arbeiðsgleði.

Hetta var tað seinasta tiltakið hjá kvinnubønarbólkinum áðrenn summarsteðgin.

## Lív Clementsen um bøn



Týskvøldið 10. juni hevði Lív Clementsen bíbliutíman í hølunum á Brekku. Hon talaði um um evnið "Bøn – biðja, lurta, hoyra og fáa".

## Møtir og tiltøk í summar



*Í summarsteðginum savnast ungdómurin saman við teimum ungu í Ebenezer hvørt leygarkvøld*

Eins og undanfarin ár hevur Lívdin aftur í ár ein summarsteðg.

Hetta merkir, at eingi týskvøldsmøtir, húsbólkakvøld ella annað verða í juli mánaði og fyrstu vikurnar í august.

Eingi ungdómsmøtir verða í Hoyvíkar skúla í juli mánaði og fyrstu vikurnar í august. Hesa tíðina savnast ungdómurin í staðin saman við teimum ungu í Ebenezer hvørt leygarkvøld.

Sunnudagarnar 20. og 27. juli og 3. august verða hvørki møtir, barnaansing, sunnudagsskúli ella UngLív í Hoyvíkar skúla.

Eftir summarsteðgin byrja møtini í Hoyvíkar Skúla aftur sunnudagin 10. august

## Glóðin við nýggjum faldara




Glóðin, sum er ein partur av hirðatænastuni í Lívdini, er komin við nýggjum faldara.

Ein bólkur av kvinnum og monnum bjóða seg til undir tagnarskyldu at lurta, samtala og biðja við fólki, sum stríðast við eitthvørt. Hvør enn trupuleikin er, kunnu fólk venda sær til Glóðina. Tænastan er ókeypis.

Glóðin hevur telefonnr. 280011. Telefontíð er millum kl. 16 og 21 hvønn týsdag og hósdag.

„Menniskjan plágast ikki av veruleikanum, sum hann er, men av síni egnu fatan av veruleikanum.“




# Tiltøk



## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)

**Undirvísing, bøn og bønarskúli**

Eingi tiltøk (summarsteðgur)

## Nógvir lurtarar á alnótini

Fyri eini tíð síðan fóru vit aftur at senda møtini í Lívdini beinleiðis á alnótini, eftir at tað ikki hevði borið til í nakrar vikur vegna tøkniligar trupulleikar.

Tað tykist, sum fólk hava tikið væl ímóti hesum møguleika, og lurtað verður bæði í Føroyum og í nógvum londum kring heimin.

Til ber eisini til at taka niður bæði talur, sangir, myndir og annað av heimasíðuni hjá Lívdini. Møtini hoyrast á heimasíðuni: www.livdin.fo

Sunnudagarnar 29. juni, 6. juli og 13. juli verður einki sent. Byrjað verður aftur eftir summarsteðgin, sunnudagin 10. august.



## Skráin fyri møtini í Hoyvíkar skúla

### Sunnudagin 6. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Yndissangir*
*Talarar: Útisetar*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Tilbiðjan*
*Talari: Guttorm Joensen*

Guttorm



### Sunnudagin 13. juli

Familjumøti kl. 10.30: *Evni: Vitnisburðir*
*Talarar: Útisetar*

Tilbiðjan og læra kl. 12.00: *Evni: Sabbatsárið at enda komið*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Jógvan

### Sunnudagarnar 20. juli til 3. august

Einki møti (summarsteðgur)

### Sunnudagarnar 10. august til 31. august

Skráin fyri møtini er á heimasíðuni: www.livdin.fo

Eftir summarsteðgin byrja møtini í Hoyvíkar Skúla aftur sunnudagin 10. august

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin – www.livdin.fo · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson · Teldupostur: faldarin@livdin.fo*